# Mansunglingalandsliðið til NM

FLOGBÓLTUR

Føroyska mansunglingalandsliðið í flogbólti fer komandi hósdag til Danmarkar at leika við í kappingini um Norðurlendska meistaraheitið.

Luttakandi liðini í kappingi vera Noreg, Svøríki, Finnland, Danmark og Føroyar.

Hjálparvenjari á ferðini er Hans Mikkelsen og liðleiðari verður Jan Hente.

Liðið hevur vant nógv saman, men tað verða sterk lið, sum Føroyar skulu leika ímóti, og um mett verður í mun til úrslitini seinastu árini, so hava Føroya altíð endað aftast í hesi kapping.

Kappingin byrjar komandi fríggjadag og endar sunnudagin og allir dystirnir vera leiktir í Odense.

Føroysak liðið verður aftur í Føroyum mánadagin 12. august og høvuðsstuðul hjá liðnum er Føroya Sparikassi.




**Venjarin hjá mansunglingunum Jákup av Kák hevur úttikið hesar leikarar til kappingina:**

| Navn: | Hædd: | Felag: |
|---|---|---|
| Uni Johannesen | 184 | SÍ |
| Ian Dam | 185 | Fleyr |
| Rúni Dam | 175 | Fleyr |
| Eirikur Thomassen | 178 | Fram |
| Leif á Stongunum | 182 | Mjølnir |
| Heiðrikur Bergsson | 194 | Fram |
| Høgni Viderø | 186 | Fram |
| Dánjal J. V. Nielsen | 188 | ÍF |
| Henry Petersen | 181 | ÍF |

*Føroyska mansunglingalandsliði skal í næstum royna í kapping um norðurlandameistaraheitið í Danmark*

# FM í frælsum ítrótti

*Tíðindaskriv*

Leygardagin 10. august verður FM í frælsum ítrótti á Svangaskarði.

**Kappast verður í hesum greinum:**
100m, 400m, 800m, 5000m og longdarlopi hjá kvinnum og monnum.

Tilmelding fer fram hjá á tlf. 318504 ella 221226 innan kl. 22.00 fríggjakvøldið.

Til ber eisini at senda ein meyl við navni, felagi/heimbygd, føðiári og ynsktum greinum til athletics@athletics.fo

Kappast verður bert í teimum greinum, sum onkur hevur boðað frá luttøku í innan fríggjakvøldið.

Kappingin byrjar leygardagin kl. 13.00, men luttakararnir verða bidnir um at møta i góðari tíð fyri at fáa startnummarið. Luttøkugjald er kr. 30,-. Øll, sum eru 16 ár ella eldri, eru vælkomin at luttaka.

*Við ítróttarkvøðu*
*Sølvi R. Hansen*

# Rosenborg líkist sær sjálvum

**Molde styrkti sunnudagin um sína støðu í oddinum, har teir ivaleyst mugu finna seg í at kappast um næstfremsta plássið**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Sum tað líður alt meiri út á summarið, so er norskur fótbóltur farin at líkjast sær sjálvum alt meiri. Rosenborg hevur verið meistari nógvu tey seinastu árini. Í ár hava teir haltað leingi, og tað hevur havt við sær, at teir hava ligið miðskeiðis á støðutalvuni. Tað hevur verið ein støða, sum tey í Noregi hava verið alt annað enn von við í meiri enn tíggju ár. Men nú er vend komin í hjá teimum í Tróndheimi.

Sunnudagin hevði Rosenborg vitjan av Lillestrøm. Undan kappingarbyrjan varð roknað við, at Lillestrøm – saman við Molde – skuldi geva Rosenborg størstu kappingina um meistaraskapin. Soleiðis hevur tað als ikki gingið higartil. Rosenborg hevur ligið undir toppinum, og Lillestrøm hevur verið og er framvegis í niðurflytingarvanda.

Sunnudagin møttu 17.634 upp til stórdystin í Tróndheimi. Tey fingu ein kvøkk, tá gestirnir í 21. minutti løgdu seg á odda, og tey bitu leingi negl. Men í 62. minutti javnaði heimaliðið, og teir skoraðu aftur í 70. og 86. minutti og vunnu harvið sannførandi 3–1.

Harvið er Rosenborg komið upp á næstovasta plássið. Teir eru tvey stig aftanfyri Lyn, og tað tykist bara at vera ein spurningur, nær teir fara at taka oddasessin. Næstsíðsta vikuskifti var Lyn tíggju stig frammanfyri Rosenborg. Men í trimum dystum hava teir í Tróndheimi fingið fult, meðan tað ikki hevur gingið so væl hjá Lyn.

Sunnudagin var oddaliðið í Molde. Heimaliðið hevði sjálvandi undirtøku millum teir flestu av teimum 4.902 áskoðarunum, og tey stórfegnaðust. Molde vann 2–0, men tað tók sína tíð, áðrenn teir fingu bilbukt við oddaliðið. Hol kom ikki á fyrrenn í 77. minutti, og 2–0 sigurin varð staðfestur tíggju minuttir seinni.

Jákup Mikkelsen var allar 90 minuttirnar á beinkinum hjá Molde. Gamli liðfelagin hjá honum frá góðu døgunum í Herfølge, Steven Lustü, var í miðverjuni hjá Lyn.

Kærkomni sigurin hevur við sær, at Molde nú er á triðja plássi. Men tað er neyvan sannlíkt, at teir í Molde verða førir fyri at vinna meistaraskapin. Hann tykist Rosenborg at eiga patent uppá. Heldur verður talan um kapping um annað og triðja plássið, sum bera atgongd til Europa Cup fótbólt við sær.

Støðan hjá Molde í tí kappingini styrknaði eisini sunnudagin, tí Odd Grenland úr Skien tapti á útivølli ímóti botnliðnum. Start úr Kristiansand hevur roynst heilt illa í ár, men sunnudagin vunnu teir 2–0 á Odd Grenland.

Start er framvegis niðast, og Sogndal er framvegis á hinum niðurflytingar plássinum. Hesa ferð vóru teir á útivølli í Bodø, og heimaliðið vann 2–1. Í telvingini um at sleppa undan triði niðasta plássinum, sum ber kvalifikatiónsdystir við sær, eru fleiri kandidatar. Umframt Lillestrøm er Moss ein av teimum. Sunnudagin hevði Moss vitjan av Viking úr Stavanger. Úrslitið var 2–2, og tað var stórt vónbrot fyri gestandi liðið.

Bryne vann 2–1 á Stabæk og styrkti harvið um sína støðu. Í gjárkvøldið skuldu Vålerenga og Brann Bergen spæla.




## Maskinsnikkari

Vit søknast eftir maskinsnikkara at byrja 12. august ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrítin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar • Telefon 33 21 77 • Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo • Homepage: www.h-window.fo

## Formaður

Ísambandi við at formaður okkara, ígjøgnum mong ár, hevur vælt sær aðrar avbjóðingar, sóknast vit eftir formanni til framleiðslu okkara, at byrja 12. august, ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert maskinsnikkari, bygningssnikkari e.l.
- at tú hevur leiðaraevnir
- at tú ert ágrítin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar • Telefon 33 21 77 • Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo • Homepage: www.h-window.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Feløgini hava felags skrivstovu/avgreiðslu. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr timbur og plast. Í løtuni eru vit 23 starvsfólk, hvarav 8-10 eru í timburframleiðsluni.*

## Avloysarar til posthúsið í Klaksvík

Søkt verður eftir 2 avloysarum til posthúsið í Klaksvík at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin kann liggja millum 05.00 og 20.00. Arbeitt verður mánadagar til fríggjadagar.

Arbeiðið umfatar postútbering og postflutning.

Førleikakrøv: Stóra koyrikortið.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsóknir við tilhoyrandi skjølum verða at senda skjótast til ber til:

**Postverk Føroya**
**Posthúsleiðarin, Posthúsið**
**700 Klaksvík**

Nærri fæst at vita frá posthúsleiðaranum má.-fr. á telefon 455008.

## Snikkari

Vit søknast eftir snikkara at byrja 12. august ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrítin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar • Telefon 33 21 77 • Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo • Homepage: www.h-window.fo

## Sportbilur til sølu





Opel Astra Coupé 2,2i – 147 HK. 8 mðr. gamal, koyrt 12.000 km. Hevur AC, autopilot, cd-spælara o.m.a. 2 sett av sportfelgum fylgja við – einar 17" v/ summardekkum og einar 16" v/ vetrardekkum.

Verður seldur um nóg høgt boð fæst. Møguligt er við bili í býti.

**Tlf. 225309**

## Tórshavnar Ítróttarráð

Úrslit av drátti 5. august 2002.

1. Byrjanartal: 2115678802
2. Byrjanartal: 1902800072

Hesir seðlar hava vunnið:

| | |
|---|---|
| Vinningur nr. 1: | 23627 |
| Vinningur nr. 2: | 1637 |
| Vinningur nr. 3: | 5481 |
| Vinningur nr. 4 | 4182 |
| Vinningur nr. 5 | 9802 |
| Vinningur nr. 6: | 10550 |
| Vinningur nr. 7: | 24406 |
| Vinningur nr. 8: | 20386 |
| Vinningur nr. 9: | 23287 |
| Vinningur nr. 10: | 24649 |

**Ringið tlf. 227717 ella 210298**

# ÚTSØLAN

Nógv góð tilboð uppá klæðir og skógvar

**byrjar hósdagin 8. august**

**mikudagin 7. august er stongt**

**Ítróttur á Glyvrum**
**tlf. 447399**